Jørgen Niclasen
Beinir Johannesen
Árni Skaale
Jacob Vestergaard
Bárður á Lakjuni
løgtingsfólk

Broytingaruppskot VI

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 99/2023: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 19, nr. 1, verður orðað soleiðis:
"1) Í § 41 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Ásetingin í 1. pkt., 1. liði, er ikki galdandi fyri íbúgvar landsins, sum tí hava frítt at fara við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í §§ 8, 10 og 11 í løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu."

Viðmerkingar
Við 2. viðgerð varð samtykt at broyta Lov om Hegn og Markfred soleiðis, at allir íbúgvar landsins hava frítt at fara *undir ábyrgd*. Hetta er ein heldur ógreið orðing. Tí verður skotið upp at áseta, at íbúgvar landsins hava frítt at fara við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í hesi løgtingslóg. Við hesari broyting er eingin ivi um, at øll skulu halda skilhaldsreglurnar í løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu.

Serligar viðmerkingar:

Ad. 1
Við broytingini verður staðfest í Lov om Hegn og Markfred, at íbúgvar landsins, ið hava frítt at fara í føroysku náttúruni, eru fevndir av ásetingunum um skilhaldsreglur, trygd og ólógligar forðingar í løgtingslógini um burðardygga ferðavinnu.

Á Løgtingi, 21. mai 2024

Jørgen Niclasen Jacob Vestergaard Bárður á Lakjuni

Árni Skaale Beinir Johannesen